**GÓÐIR BRÚKTIR BILAR**

**Nissan Almera 2,0 Diesel GX**
gráur, 4 hurðar,
árg. 1997, 151.000 km.
**94.000**

**Nissan Primera 1,6 LX**
gráur, 4 hurðar,
árg. 1995, 126.000 km.
**69.000**

**Nissan Primera 2,0**
reyður, 4 hurðar,
árg. 1991, 121.000 km.
**47.000**

**Nissan King Cab 4x4 Diesel**
gráur, 2 hurðar,
árg. 1996.
**78.000**

**Peugeot 206 XR 1,9 D**
bronze, 5 hurðar,
árg. 1999, 88.000 km.
**110.000**

**Peugeot 306 XS 2,0 St. Car**
Ljósa bláur, 5 hurðar,
árg. 1999.
**130.000**

**Peugeot 306 Diesel Aircon**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1999, 47.000 km.
**125.000**

**Opel Astra 1,6**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 109.000 km.
**67.000**

**Opel Astra 1,6 Club Wagon**
reyður, 5 hurðar,
árg. 1995, 110.000 km.
**55.000**

**Opel Astra 1,7Dtl**
grønur, 4 hurðar,
árg. 1997, 108.000 km.
**99.000**

**Opel Astra 1,8 Club Wagon**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1995, 104.000 km.
**70.000**

**Opel Astra 2,0 Dti Wagon**
gráur, 5 hurðar,
árg. 1998, 76.000 km.
**130.000**

**Opel Astra 1,7d Wagon**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 142.000 km.
**55.000**

**Opel Astra 1,7d Wagon**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1995, 99.000 km.
**65.000**

**Opel Astra 1,6 Club Wagon**
brúnur, 5 hurðar,
árg. 1997, 40.000 km.
**85.000**

**Opel Vectra 1,4**
hvítur, 4 hurðar,
**26.000**

**Opel Vectra 2,0 CD**
grønur, 4 hurðar,
árg. 1997, 48.000 km.
**134.000**

**Saab 900 S**
reyður, 5 hurðar,
árg. 1995, 119.000 km.
**98.000**

**Ford Fiesta**
bláur, 5 hurðar,
130.000 km.
**10.000**

**Mazda 323 F 1,6i GLX**
vínreyður, 5 hurðar,
árg. 1996, 116.000 km.
**65.000**

Bilarnir finnast eisini á:
**www.nissan.fo**

**P/F Meinhardt Arge**
v/ oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin

Svimjihøllin í Klaksvík:

# Ein dýr og vánalig loysn!



Um eini 4 ár skal svimjihøllin aftur latast aftur í samband við tey komandi byggistigini

**Hetta sigur Søren Olsen, fyrrverandi venjari hjá svimjifelagnum Ægir í Klaksvík, um umvælingarnar, sum skulu verða gjørdarí svimjihøllini tey komandi árini**

SVIMJIHØLL
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Svimjihøllin í Klaksvík letur í dag upp aftur, eftir at hon ,síðani august mánaða seinasta ár hevur verið afturlatin í samband við tað fyrsta av trimum byggistigum, hvørs endamál er at umvæla og nýmótansgera høllina.

Av tí sama hava klaksvíkingar og norðoyingar annars ongan møguleika havt fyri at kunna taka nøkur tøk í hyljunum, og tað hevur eisini havt sínar fylgir fyri svimjifelagið í Klaksvík.

### Katastrofalar fylgir

Svimjifelagið Ægir í Klaksvík kundi áðrenn afturlatingina av svimjihøllini vísa á tey frægastu úrslitini í langa tíð.

– Vit vunnu stórt sæð alt, sum var at vinna, greiðir Søren Olsen frá, sum var venjari hjá Ægir hetta tíðarskeiðið.

– Vit settu enntá føroyskt met, og tað klárar man ikki á hvørjum ári. Tað er long tíð síðani, at tað hevur gingist Ægir so gott, sum tað gjørdi beint áðrenn, at svimjihøllin lat aftur, sigur Søren.

Hann sigur víðari, at afturlatingin av svimjihøllini hevur havt katastrofalar fylgir fyri svimjararnar og svimjifelagið í Klaksvík. Í tíðini, meðan svimjihøllin hevur verið afturlatin, hava tey ongan møguleika havt fyri at halda fast við góða venjingarstøðið, sum tey vóru komin á.

– Onkur hevur ferðast til Gøtu av og á, har hann hevur vant við svimjifelagnum Skeggjum, men tað ber jú illa til, tá ein samstundis gongur í skúla, sigur Søren. Ægir plagar eisini at skipa fyri tiltøkum av ymsum slag fyri at fáa eitt sindur av peningi inn til felagið, men eisini hetta virksemi hevur ligið stilt í hesar 7 mánaðirnar, sum svimjihøllin hevur verið afturlatin.

Afturlatingin hevur eisini ført við sær, at Ægir væntandi hevur mist fleiri av teim svimjarum, sum vóru við í felagnum í august mánaða.

Men hóast svimjihøllin í dag letur upp aftur, so fer Ægir væntandi ikki í gongd við nakað sum helst fyrr enn næsta kappingarárið byrjar í august mánaða.

– Núverandi kappingarár er nærum liðugt, so tað nyttar okkum einki at royna at koma við har. Tað einasta, ið er eftir, er FM-kappingin, men heldur ikki har kunnu vit gera okkum nakra vón um at verða við.

Um tú skalt gera teg galdandi í svimjing, so noyðist tú at venja øgiliga hart fyri at koma upp á eitt hóskandi støði. Og tað klárar eingin uppá so stutta tíð, greiðir Søren frá, sum annars eisini væntar, at tað fer at taka langa tíð hjá svimjarunum í Klaksvík at koma upp aftur á sam støði, sum tey vóru á áðrenn afturlatingina av svimjihøllini.



Søren Olsen, fyrrverandi venjari hjá Ægir, heldur ikki, at umvælingarnar í svimjihøllini eru tann rætta loysnin

### Hol í høvdið-projekt

Søren Olsen hevur eisini sína avgjørdu meining um byggistigini, sum skulu verða framd í svimjihøllini.

– Sjálvur haldi eg tað vera eitt fullkomið hol í høvdið-projekt at fara undir slíkar umfatandi broytingar í eini so gamlari svimjihøll, sigur hann.

Søren heldur, at ístaðin fyri at farið í gongd við nakrar so umfatandi broytingar, so hevði rættasta loysnin heldur verið at bygt eina nýggja svimjihøll, so tann gamla kundi verið opin, inntil tann nýggja varð klár at brúka.

– Um eini 4 ár skal núverandi svimjihøllin latast aftur enn eina ferð í samband við tey næstu byggistigini, og hetta merkist sjálvandi aftur hjá felagnum, sigur Søren.

Eftir ætlan skal hetta næsta byggistigið umfata broytingar innan í sjálvari høllini. Millum annað skulu hyljarnir gerast av nýggjum, og ein stór vatnskreiðubreyt skal eisini leggjast við ein av hyljunum. Eitt kafeteria verður væntandi eisini at finna í høllini, tá umvælingarnar eru komnar afturum.

– Hetta eru alt sera kostnaðarmikil stig, sum taka langa tíð, og er eftir mínari meting eitt púrasta hol í høvdið-projekt. At bygt eina nýggja svimjihøll hevði verið nógv bíligari, um vit hyggja frameftir, sigur Søren.

Søren veit annars ikki at siga, um hann verður ein av venjarunum hjá Ægir til komandi kappingarárið. Hann hevur fingið okkurt tilboðið aðrastaðnis frá, men hevur enn ikki tikið nakra avgerð um, hvar hann fer at vera.

– Eg eri klaksvíkingur við stórum K, og tí vil hjartað eisini altíð brenna fyri Klaksvíkini. Men útlitini fyri at kunna skapa nøkur góð úrslit eru sera vánalig, nú svimjihøllin skal lata aftur í tíð og úrtíð, greiðir Søren frá.



# Landsstýrismaður í stríð við viðtøkur Framtaksgrunsins

**Tað er í stríð við viðtøkurnar fyri Framtaksgrunnin, tá Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, sigur, at hann ikki vil hava Føroya Fiskavirking sterkari enn felagið er, segði nevndin í Framtaksgrunninum. Landsstýrismaðurin vísir hesum aftur og sigur, at hann hevur eingi krøv sett yvirhøvur, men bara sagt sína hugsan um málið**

VINNUMÁL
*Edvard Joensen*

Bjarni Djurholkm tekur ikki undir við, at Føroya Fiskavirking verður styrkt í mun til tað, felagið í løtuni er. Hetta er beinleiðis í stríð við viðtøkurnar hjá Framtaksgrunninum, sum eigur Føroya Fiskavirking. Endamálið hjá Framtaksgrunninum er at fáa mest møguligt burtur úr hvørjari krónu, sett er í vinnuna.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður vísir hesum aftur og vísir samstundis á, at viðtøkurnar siga heilt greitt, at tá yvirskot er hjá eini fyritøku, sum Framtaksgrunnurin eigur, skulu aktivini hjá henni seljast.

–Tað er hetta, eg havi víst á, sigur Bjarni Djurholm. Eg havi als eingi boð givið yvirhøvur, men bara sagt mína hugsan um málið, og tað havi eg loyvi til.

Bjarni Djurholm sigur við Sosialin, at hann hevði uppskot um, at partabrøv í Fiskavirking vórðu lutað út til øll starvsfólk hjá felagnum fyri á tann hátt at fáa privatiserað felagið so breitt sum gjørligt.

Til hetta svaraði nevndin, sigur Bjarni Djurholm, at hon hevði hugsað um ein líknandi møguleika, men har var býtislykilin soleiðsi, at leiðslan fekk størsta partin, meðan restin av arbeiðsbólkinum fekk tann minna.

–Hesum kundi eg ikki taka undir við, sigur Bjarni Djurholm.

Fyrrverandi nevndin í Framtaksgrunninum segði seg frá, við millum øðrum teirri grundgeving, at hon ikki fekk arbeitt optimalt, tí landsstýrismaðurin legði seg út í arbeiði hennara. Hesum noktaði landsstýrismaðurin fyri.

Víst varð til brævaskifti, har nevndin segði, prógv vóru fyri hesum. Sosialurin bað um innlit í hesi brøv, men fekk noktandi svar, tá málið varð viðgjørt í pressuni herfyri.



*Bjarni Djurholm vísir aftur, at hann sum landsstýrismaður við vinnumálum arbeiðir í móti viðtøkunum hjá Framtaksgrunninum. Tað gjørdi nevndin hinvegin, sigur hann, tí tað stendur heilt greitt, at tá ein fyritøka hjá Grunninum gevur yvirskot, skulu aktivini seljast. Men gamla nevndin vildi heldur savna meira inn í Føroya Fiskavirking*

Um vikuskiftið fekk Sosialurin kortini brøvini útflýggjað, og stendur har heilt greitt, at Bjarni Djurholm er ikki samdur við nevndina, sum tá sat fyri Framtaksgrunnin.

Hann skrivar í brævi til nevndina, dagf. 21. des. 2001, at hann... »tekur ikki undir við, at at Føroya Fiskavirking í samband við eina umskipan av Fiskasøluni skal gerast størri og sterkari, enn tað er.«

Hesi orð leggur nevndin soleiðis út, at Bjarni Djurholm ynskir ikki, at Føroya Fiskavirking skal arbeiða optimalt, sum fyriskipað er, soleiðis at teir almennu pengarnir, sum Framtaksgrunnurin hevur sett í felagið, skulu geva optimalt avkast.

Bjarni Djurholm sigur hinvegin, at hesi orð skulu síggjast í ljósinum av samskifti, sum fyrr hevði verið millum landsstýrismannin og nevndina.

Tað er júst í tí samskiftinum, at landsstýrismaður hevur lagt trýst á nevndina, segði fyrrverandi nevndin.

Grundin til hesa støðu er, at nevndin, sum tá sat í Framtaksgrunninum, vildi flyta partar av Føroya Fiskasølu yvir í Føroya Fiskavirking fyri á tann hátt at styrkja hesa fyritøkuna, sum gekk væl. Soleiðis metti nevndin, at hon kundi fáa sínar íløgur afturvunnar.

Landstýrismaðurin var í móti hesum og hevur, sum skilst á keldum hjá Sosialinum, havt at nevndini og beinleiðis vilja steðgað ætlanum hennara.

Tað skal envndin so aftur hava lagt út sum, at Bjarni Djurholm hevur arbeitt í beinleiðis stríði við viðtøkurnahjá Framtaksgrunninum.

Bjarni Djurholm svaraði aftur við at boða frá, at nevndarlimirnir ikki skuldu rokna við at verða afturvaldir, Í øllum førum skuldi formaðurin skiftast út. Tað fekk so alla nevndina til at siga seg frá.

Eisini hevur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í hesum høpi ført fram, at hann hevði hesa støðu, tí hann er eftirlitsstovnur hjá Framtaksgruninum. Men tað er ikki rætt, tí eftirlitið við almennum grunnum, sum eitt nú Framtaksgrunninum, hevur danska Erhvers- og Selskabsstyrelsen.

# Verkfallið órógvaði tyrluflúgvingina

**Tað var slíkur gravgangur eftir at leiga tyrluna fríggjadagin, at tað gek út yvir onkran av rututúrunum, sum skuldu verið gjørdir. Eitt nú var einki samband út í Mykines fyrr en móti kvøldi, hóast tyrlan átti at verið har úti klokkan tíggju fyrrapartin**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Fólk, sum skuldu við tyrluni út í Mykines klokkan tíggju fríggjamorgunin, sluppu ikki avstað fyrr enn klokkan seks seinnapartin, hóast ruta eisini átti at vera klokkan fýra seinnapartin. Eingin onnur frágreiðing varð givini enn, at tyrlan fleyg leigutúrar.

Úti í Mykinesi gingu fólk og bíðaðu eftir tyrluni, sum ikki kom, og á flogvøllinum gingu ferðafólk eisini og bíðaðu eftir at sleppa út í Mykines.

Tá klokkan var trý seinnapartin, fóru tey aftur at vita, hvussu vorðið var og vildu vera í góðari tíð, til tyrlan kom klokkan fýra, sum ferðaætlanin sigur. Men hon kom ikki fyrr enn klokkan seks.

Magni Arge, stjóri á Atlantsflogi, sigur, at hann visti ikki um hesa støðuna fyrr enn hann kom til arbeiðis mánamorgunin.

Hann hevur kannað málið, sigur hann, og viðgongur trupulleikan.

Tó leggur hann afturat, at tyrlan, tá avtornaði, hevði verið heilar fimm ferðir í Mykinesi, áðrenn fíggjadagurin var av.

–Tað, sum hendi, greiðir Magni Arge frá, var, at tað stóð bert eitt ferðafólk uppskrivað til Mykinesrutuna klokkan tíggju. Ein ávís seinking var longu tá, og sera nógv trýst á tyrluni. So gjørt varð av, at hetta ferðafólkið skuldi bíða til seinnapartstúrin.

Men onkunsvegna hevur innanhýsis samskiftið ikki riggað, tí eingi boð vórðu givin víðari um hesa broytingina.

Ikki fyrr enn út móti kvøldi kom tyrlan so út í Mykines, og øll ferðafólkini, sum tá vóru, sluppu avstað, umfram at fýra farmatúrar vórðu gjørdir.

Annars var fríggjadagurin heilt óvanligur orsakað av verkfallinum, sigur Magni Arge. Neyðugt var at biða fólk, sum annars hevði frí, til arbeiðis, so at flúgvast kundi við báðum tyrlunum.

Tað mundi vera einar tríggjar feðrir so nógvar uppringingar til Atlantsflog tann dagin, í mun til ein vanliga dag. Einar 800 uppringingar, metir stjórin á Atlantsflogi, at felagið fekk.

–Ta einu løtuna stóðu 151 fólk uppskrivað at sleppa til Suðuroyar við tyrluni, sigur hann.

Hóast hesi misskiljingina, sum var fríggjadagin, leggur Magni Arge dent á, at leiguflúgving á ongan hátt verður tikin fram um høvuðsskyldurnar hjá tyrlutænastuni.

Tær eru at flúgva føstu ruturnar og at røkja leitingog bjargingaruppgávurnar fyri Vaktrar- og Bjargingartænastuna.

–Tær báðar uppgávurnar fara altíð at standa í fremstu røð, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantsflogi.



*Frígjadagin bíðaðu fólk í Mykinesi eftir tyrluni í átta tímar uttan at fáa boð um, hvat hendi*
*Mynd: Edvard Joensen*